Tjaldur-Kyndil 27-32 (16-13):

# Kyndil eftir heiðurs-merkjunum

**Steypavinnararnir úr Kyndli eru nú ájvanir Neistanum á triðja plássinum, eftir at teir sunnudagin fingu øll stigini við sær úr Runavíkini**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hóast eitt heldur misjavnt kappingarár, har upp- og niðurtúrarnir hava verið nógvir, hevur Kyndil í øllum førum fingið eitt gullmerki burturúr, tá teir vunnu steypafinaluna herfyri.

Kanska var steypasigurin júst tað, sum teir grønu úr Havn høvdu tørv á, tí í øllum førum hava teir síðani hetta klintrað upp móti triðja plássinum á talvuni við fullari ferð.

Sunnudagin vitjaði Kyndil í Runavík, og har komu enn tvey stig á kontina, soleiðis at teir nú eru ájavnir grannunum úr Neistanum á triðja plássinum.

## Átta á rað avgjørdu

Tað var tó ikki so, at Kyndil hevði lætt spæla alla tíðina í Runavík. Tvørtur ímóti, so var tað Tjaldur, sum tóktist greitt omaná, tá dysturin var hálvrunnin. Liðini høvdu annars fylgst allan fyrra hálvleik, men seinstu fimm minuttirnar tóktist alt at skrædna hjá Kyndli, og við seks málum á rað struku heimamenninir avstað.

Tí var setningurin hjá Kyndli greiður eftir steðgin, men tað var givið, at fortreytirnar til hetta ikki vóru av teimum bestu. Liðið var nakað skert, nú bæði Heini Bendtsen og Regin Johannesen vóru úti við skaða – Heini verður kanska ikki við aftur í ár. Hóast hesir kanska ikki hava talst millum størstu nøvnini á liðnum, so hevur serliga Heini markerað seg væl eftir jólasteðgin, og tað er ikki minst skoringum hansara av veinginum at takka, at Kyndil seinastur dystirnar hevur havt somikið góða breidd í álopsspælinum.

Leingi sá eisini út til, at tað skuldi gerast sera striltið hjá Kyndli, men brádliga slerdu teir grønu turbona til. Átta mál á rað innan átta minuttir settu líka sum allan iva til viks, og so ráddi bara um at halda fast.

Tað gjørdu teir grønu eisini uttan stórvegis hóvasták. Hóast Tjaldur royndi at seta ferðina upp, so megnaðu teir ongan tíð at skapa spenning í aftur dystin, og gestirnir kundu sostatt fara aftur til Havnar við tveimum stigum.

## Bronsan er nær

Stigini førdu við sær, at Kyndil nú hevur vunnið seg ájavnt grannunum úr Neistanum, sum hinvegin tykjast vera steðgaðir fullkomuliga upp. Júst Neistin er næsta mótstøðuliðið hjá Kyndli, sum soleiðis hevur møguleikan at skrykkja seg mest sum leyst í oddinum, áðrenn verjandi meistararnir úr VÍF standa fyri framman annað vikuskiftið.

Tjaldur er hinvegin framvegis einsamalt í botninum, og sum støðan er í løtuni, so tykist fjarstøðan til ovaru liðini bara at vaksa. Niðurflyting er tó framvegis ikki aktuel, men eftir upptúrin, sum liðið hevði í endaspælinum í fjør man tað kortini kennast nakað hugstoytt, at liðið aftur í ár hevur lagt seg niður á botnin á talvuni.

### Dysturin í tølum

**Tjaldur-Kyndil 27-32 (16-13)**
Málskjúttar:
Tjaldur: Dragisa Stojovic 8, Mortan Hansen 6, Zoran Sarcevic 5(1), Arnfinn Langgaard 3, Ken Bærendsen 3, Áki Hansen 1, Kári Hansen 1
Kyndil: Finnur Hansson 7(1), Ken Zachariasen 6, Jacob Jónsson 5, Høgni Klein 5, Hans Áki Dal-Christiansen 5, Janus Einar Sørensen 3, Leif Mikkelen 1
Brotskøst: Tjaldur 4, Kyndil 2
Útvísingar: Tjaldur 2, Kyndil 3
Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansen & Sámal Hansen.



*KÍF hevur veruliga fingið ferð á seinastu dystirnar. Liðið hevur nú strítt seg upp í bronsustríðið, og tann støðan var í øllum førum púrasta óhugsandi fyri bert tveimum mánaðum síðani*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

KÍF-H71 23-29 (13-17):

# Nú er stuttligt í Hoyvík

**Hondbóltsfepurin í Hoyvík hevur nátt nýggjum hæddum, nú yngsta høvuðsstaðarfelagið hevur fingið fótin inn um í heiðursmerkjastríðnum**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hoyvíkingar halda framvegis kósina móti hægru luftløgunum. Leygardagin skúgvaðu teir sambúgvarnar úr KÍF til viks í bronsustríðnum, har tú nú fyrst og fremst eru tey trý havnarfeløgini, sum stríðast um seinasta heiðursmerkið, eftir at VÍF og StÍF væntandi hava tikið sær av teimum báðum fremstu plássunum.

Hoyvíkingar vóru annars nakað skerdir, eftir at leikandi venjarin, Uni Wardum, fekk reyða kortið í seinastu sekundunum av dystinum móti Tjaldri. Júst tað at Uni gjørdist leikandi og ikki bara venjari hevur annars verið ein av høvuðsorsøkunum til framgongdina hjá H71, ,men leygardagurin prógvaði í øllum førum, at alt ikki stendur og fellur við honum.

Fyrstu løtuna gekk tað kanska nóg so striltið, og fyri tað mesta vóru tað kollfirðingarnir, sum høvdu munin, men so raknaði H71 við. Seinastu løtuna undan steðginum vunnu teir við átta málum móti trimum, og so var grundarlagið lagt undir sigrinum.

Og tað var ongan tíð soleiðis, at sigurin kom í vanda seinna umfarið. Við at ansa Damir Oros væl, varð einasta veruliga skothóttanin hjá kollfirðingunum tikin úr spælinum, og sum minuttirnir gingu líktist tað alt meira einum trivaligum stórsigri.

Sum tað tó ofta hendir í slíkum førum, so settu hoyvíkingarnir tó ferðina niður móti dystarenda. Munurin var tó vorðin alt ov stórur til at nakar spenningur av nøkrum slag kom í aftur dystin, men um ikki annað, so fingu kollfirðingar soleiðis avmarkað tapið til tey seks málini, sum talan varð um.

## Full ferð á

Við sigrinum – tí fjórða í seks dystum í endaspælinum – hava hoyvíkingarnir av álvara strítt seg inn í heiðursmerkjadystin. Ein støða, sum vildi verið óhugsandi, ta´farið varð inn í endaspælið.

Og tað kann væl verða, at hoyvíkingarnir fara at vinna seg enn longur upp. Góða gongdin í endaspælinum byrjaði við einum fullkomuliga óvæntaðum sigri á Neistanum, og seinni dysturin móti Neistanum er tann, sum er næstur á hoyvíkskalendaranum.

Kollfirðingar mistu hinvegin eitt fet í stríðnum um at koma inn í bronsudystin, og sum endaspælið hevur lagað seg, so er einki at taka seg aftur í, at kollfirðingarnir munnu iðra seg um mistu møguleikarnar. Hesa ferð var tó ikki so nógv at gera, men dysturin sýndi tó týðiliga, at kollfirðingarnir framvegis í ovurstóran mun dúva upp á skotstyrkina hjá Damir Oros. Liðið hevur tó fleiri aðrar leikarar við góðum hondbóltsevnum, men enn hava hesir so til góðar at sýna, at teir eisini eru førir fyri at taka ábyrgd á seg, tá rákið er ímóti.

### Dysturin í tølum

**KÍF-H71 23-29 (13-17)**
Málskjúttar:
KÍF: Damir Oros 8(6), Petur Martin Poulsen 5, Mirko Milenkovic 4, Vagnur Johannesen 2, Regin Petersen 2, Finn Heri Johannesen 1, Gert Hansen 1
H71: Halgir Dahl Olesen 7(1), Niels Viggo Niclasen 5, Kristian Eli Zachariasen 5, Bárður Brimvík 4, Brandur Johansen 3, Johnny Durhuus 3, Annfinnur N. Debess 2
Brotskøst: KÍF 6, H71 1
Útvísingar: KÍF 2, H71 5
Dómarar úr Neistanum: Sámal Hansen & Kristian Johansen



Neistin-StÍF 28-30 (9-13):

# Gulltenninar hómaðust

**Í tjúgu minuttir beit StÍF frá sær á sama hátt, sum teir gjørdu í grundspælinum, og tó at teir síðani tóku sær av løttum, so mundi avrikið sunnudagin geva góðar vónir undan toppbrakinum móti VÍF**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað var um at vera seinasta útkall hjá StÍF, tá teir sunnudagin vitjaðu hjá Neistanum. Gamaní hava strandingar sum einasta liðið enn ikki tapt nakran dyst í grundspælinum. Men spælið hevur langt ífrá verið á sama sannførandi støði, sum tað var í grundspælinum, og tveir javnleikir móti ávíkavist Kyndli og KÍF høvdu viðført, at VÍF hevði vunnið seg tvey stig framum á stigatalvuni, har strandingar tó áttu ein dyst tilgóðar.

Hesin dysturin var tann móti Neistanum, sum var á skránni sunnudagin. Eitt neistalið, sum als ikki tykist hava nátt somu hæddum í endaspælinum, sum teir gjørdu í grundspælinum, men tað hevði StÍF tó heldur ikki. Í øllum førum ikki fyrr enn sunnudagin.

## Gullglottar

Tí tað var skjótt at staðfesta, at nú er StÍF um at koma fyri seg aftur. Fyrstu 20 minuttirnir var talan mest sum um uppvísing í, hvussu hondbóltur eigur at spælast. Við útgangsstøði í eini ágangandi og framrættaðari verju trýstu teir alla tíðina mótstøðumenninar, og tá hesir so framdu okkurt mistakið, gekk tað skjótt fyri seg hinvegin.

Í løtum tóktist dysturin mest ganga tann vegin, at meðan gestirnir koyrdu á við fullari ferð, so royndu teir á heimaliðnum mest sum bara at toga ferðina niður, men tað var tó heldur misjavnt, hvussu hetta hilnaðist.

Fyrstu løtuna av seinna hálvleiki tóktist gongdin í løtum vera hin sama, sum hon hevði verið fyrra umfarið. Nú kanska einamest tí heimaliðið hevði givið skarvin yvir. Har var als einki bit í skotroyndunum, sum Marian Cirloganescu sjáldan hevði nakrar stórvegis trupulleikar av, og so við og við bendi alt meira og meira á stórsigur til strandingarnar.

Ivaleyst roknaðu geistnri eisini við, at so var, og tá teir so ótilvitað settu ferðina nakað langt niður, bragdaði brádliga hjá Neistanum. Áki Mørk og ikki minst Morgan Knezevic, sum annars hevur verið ein skuggi av sær sjálvum síðani jólasteðgin, tóktust nú brádliga at fáa ferð á. Átta mála leiðslan minkaði niður í helvt, og ein vón hómaðist hjá teimum bláu, men tað var tó skjótt, at eisini hendan varð sløkt. Strandingar settu ferðina eitt lítið vet upp afturat, soleiðis at tað kundi staðfestast, hvat liðið var hitt betra, og so kundi tað vera líkamikið, at Neistin aftur slapp at minka nakað um munin seinastu minuttirnar.

## Klárt til gullbrakið

Við sigrinum vann StÍF sær sjálvandi tvey sera týdningarmikil stig, sum bera við sær, at tað stendur á jøvnum, nú vestmenningarnir koma inn á Skála mikudagin.

Kanska meira týdningarmikið var tó, at strandingar í løtum sýndu sama slag av spæli, sum undan vetrarsteðginum førdi teir á ovastu rók á talvuni. Kvika ágangandi spælið, har mótstøðuliðini sjáldan fáa meira enn brotpartar av sekundum at umráða seg í, var nú aftur sett á dagsskránna. Eitt spæl, sum er undirhaldandi at hyggja at, og ikki minst eisini sera effektivt, tá alt gongur í eina hægri eind, soleiðis at mótstøðuliðini sjáldan hava nakað mótvápn, tá StÍF rættiliga sleppur ígongd.

Um talan bert var um eitt eingangsupplivilsi hjá trúgvu áskoðarunum, ella um hetta er linjan, sum nú verður løgd, ber sjálvandi illa til at siga enn. Men tað líktist í løtum spælinum, sum kann tryggja strandingum gullið, og so er spurningurin bara, um teir aftur – og helst yvir longri tíðarskeið enn 20 minuttir – eru førir fyri at finna tað fram mikudagin.

Fyri Neistan var dysturin hinvegin enn ein staðfesting av, at liðið ikki skal verða partur av oddastríðnum í ár. Tað var annars nógv, sum bendi tann vegin eftir grundspælið, men síðani er nógv broytt. Enn heldur liðið tó fast um triðja plássið, men grannarnir úr Kyndli hava nú togað seg upp á sama stigatal, so heiðursmerkini standa upp á spæl, tá grannauppgerð verður í Havn komandi mikukvøld.

### Dysturin í tølum

**Neistin-StÍF 25-30 (9-13)**
Málskjúttar:
Neistin: Áki Mørk 6, Morgan Knezevic 6(2), Ræni Slættanes 3, Helgi Justinussen 3, Ragnar Stakksund 2, Kári Mortensen 2, Dann Tholeifsson 2, Birgir Kass 1
StÍF: Costin Dumitrescu 9(4), Sveinur Justinussen 5, Kristjan Petursson 4, Bent Djurhuus 4, Andre F. Danielsen 3, Alexandur Johansen 3, Jón Ramussen 1, Artur Johansen 1
Brotskøst: Neistin 4, StÍF 4
Útvísingar: Neistin 1, StÍF 3
Dómarar úr Tjaldri: Hartvig Joensen & Trygvi Mortensen. Komu væl frá uppgávuni. Ikki minst tí teir alla tíðina royndu at hava samband við leikararnar.



*Við útgangsstøði í ein i vælvirkandi verju trumlaði StÍF Neistan niður fyrstu 20 minuttirnar av dystinum, og eftir hetta ráddi bara um at halda tørn hjá oddaliðnum, sum veruliga tykist hava funnið stórformin undan brakinum á Skála mikukvøldið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

StÍF-Tjaldur 23-17 (11-9):

# Tryggur heimasigur

**Tjaldur fekk ikki gjørt stórvegis við botnstøðuna, tá tær hittu StÍF hóskvøldið**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Dysturin millum liðini bæði skuldi uppruna liga verið leiktur mikukvøldið í farnu viku, men varð tá útsettur. Hósdagin vóru teir 60 minuttirnir so avgreiddir, men av misgávum høvdu vit ikki úrslitið við í leygardagsblað okkara.

Um dystargongdina er annars at siga, at Tjaldur fyri ein stóran part var rættiliga væl við. Fram til hálvan seinna hálvleik var lítil og eingin munur, men tá StÍF so skoraði fýra ferðir á rað, var einki at gera hjá gestunum, sum enn eina ferð máttu taka til takkar við tapi.

### Dysturin í tølum

**StÍF-Tjaldur 23-17 (11-9)**
Málskjúttar:
StÍF: Asta Petrauskiene 8, Alina Olaru 4, Anna Maria Berthelsen 4, Anna B. Danielsen 4, Poula D. Olsen 2, Sunfríð Jacobsen 2(1), Elin Jacobsen 1
Tjaldur: Milica Ergic 8(1), Lenka Ribaric 5, Oddvá Fossdalsá 1, Mona Langgaard 1, Heidi Heinesen 1, Kristine Ellingsgaard 1
Brotskøst: StÍF 2, Tjaldur 1
Útvísingar: Tjaldur 5
Dómarar úr Stjørnuni: Flemming Jacobsen & Kartin Joensen